# Dagligt breyð hvønn dag

**Nýggj andaktsbók er komin út við andaktum til hvønn dag í árinum – eisini til 29. februar. Menn av Argjum hava sett sítt sín dám á bókina**

KRISTILIGAR BØKUR

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tað er ikki á hvørjum degi at ein andaktsbók kemur út á føroyskum. Men tað vil so ikki siga, at ikki tørvur hevur verið á eini slíkari.

Og tað er heldur ikki á hvørjum degi, at ein fær eina slíka bók til nýtslu í gerandisdegnum, sum eisini tekur hædd fyri eini andakt, tá skotár er.

Bókin "Dagligt breyð" er væl kend í mongum føroyskum heimum, og mong hava higartil havt gleði og fragd av at lesa andaktir úr hesi bókini á norskum og á donskum.

Heimamissiónsforlagið í Nesvík hevur nú givið út hesa bókina, ið norski gudfrøðingurin Carl Fr. Wisløff skrivaði fyri mongum árum síðani.

Tað eru argjamenninir Henry D. Joensen, lærari og trúboðarin Jóhannes Mortensen sum hava týtt hana til føroyskt.

Bókin er eisini myndprýdd av einum øðrum argjamanni. Finnleif Mortensen hevur nevniliga teknað permumyndina, eins og myndirnar inni í bókini. Her er bókin skipað soleiðis, at hvør mánaður hevur sína mynd, sum er at finna við hvørt andaktstykki henda mánaðin.

- At byrja dagin við einum Guds orði er ein góður vani. Og kann henda bókin eisini verða ein góð hjálp til tað, sigur forlagið um bókina.

Bókin er slakar 400 síðu til støddar og kostar 275 kr. Hon fæst hjá Heimamissiónsforlagnum og í bókahandlunum kring landið.




*Tveir argjamenn hava týtt og ein argjamaður hevur myndprýtt nýggjastu føroysku andaktsbókina*

# Ein kafé fyri brúkaran

**Tey sinnisveiku fáa nú eitt gott stað at savnast í, tá Løkjukafé'in á Argjum letur upp mánadagin**

SINNISVEIK

*Snorri Brend*

**Argir:**
Tað eru ikki nógvar kafé'ir á Argjum. Men mánadagin letur í øllum førum upp ein nýggj kafé við navninum "Løkju-kaféin".

Endamálið við hesi kafé'ini er at geva teimum sinnisveiku ein møguleika at savnast til eitt hugnaligt og gevandi prát afturvið einum góðum drekkamunni.

Tað er í fyrstu syftu Stuðulsskipanin fyri vaksin sum tekur sær av kafé'ini.

Men Fía Jespersen, ið er pedagogiskur ráðgevi hjá skipanini sigur, at tey hava ætlanir um at lata brúkaran sjálvan taka yvir so líðandi.

– Vit fara í øllum førum at byrja soleiðis. Og so fáa vit at síggja, hvør orkan verður hjá teimum sjálvum at føra arbeiðið víðari, sigur hon í stuttari viðmerking við Sosialin.

Løkjukafé'in heldur til í húsunum hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin í Lækjartúni. Hon liggur ájavnt við veghæddina, soleiðis at tað eisini er væl atkomuligt hjá rørslutarnaðum brúkarum.

Kafé'in letur sum nevnt upp mánadagin, og verður annars opin frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 12:30 til 15.




*Tey rigga nýggju kafé'ina til – Fía Jespersen og leiðarin í Stuðulsskipanini, Regin Johansen.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

